## VIÐMERKINGAR

## DAGSINS MEINING

# Mangt verður í neyðini nýtt

Nú tað nærkast einum nýggjum ári, sum eisini er valár, er greitt, at mong mál fara at verða tikin framaftur sum serstøk mál. Eitt teirra er flogvallarmálið. Rok kom aftur um flogvallarmálið - ætlanina at yvirtaka flogvøllin - tá stjórin á flogvøllinum segði tað, sum øll vistu. Hesin segði í útvarpssamrøðu, at stígur kom í ætlanina at byggja flogvølllin út við glíðibreyt og øðrum, tá ætlanin hjá landsstýrinum at yvirtaka flogvøllin gjørdist ítøkilig.

Tað mundi koma rættiliga ávart á mong, tá løgmaður herfyri trein fram í ÚF og helt fyri, at hetta var nýtt, at flogvøllurin var ikki útbygdur, tí føroyingar skuldu yvirtaka flogvøll, bygningar og annað, sum danska loftferðsluverkið eigur ídag. Bræv skuldi sendast í stundini til Danmarkar um hetta mál. Um yvirtøkan lá í vegin fyri ein nútímansgerð, so skuldi henda ætlan skjótast út. Margháttligt at koma til slíka niðurstøðu, tá vit øll jú leingi hava vitað, at hetta hevur verið støðan alla tíðina.

Tey, sum hava fylgt við gongdini og samráðingunum, vóru púra paff. Tað kom jú fram fyrr í ár, tá Vinnumálastýrið hevði fund við danskar myndugleikar um yvirtøkuna, at danir vildu ikki útbyggja flogvøllin, tá føroyingar kortini skuldu yvirtaka hann. Um hetta varð sagt í einum tíðindaskrivi, ella um tað bara kom fram í eini tíðindafrásøgn, skal ikki verða sagt á hesum stað í dag. Men tað kom í øllum førum fram.

Hetta er kanska orsøkin til, at Fólkaflokkurin tóktist mæla við tveimum tungum. Vágatingmaðurin tók undir við Anfinni Kalsberg, løgmanni, meðan Bjarni Djurhuus, sum jú kennir alt til samráðingarnar um yvirtøku, hevði eina aðra áskoðan.

Í grundini er tað ikki løgið, at Jørgen Niclasen tók undir við løgmanni. Hann hevði fáar dagar frammanundan havt eitt stak vánaligt val, tá hugsað verður um, hvussu nógv Vágar eru forkelaðar hetta valskeiðið. Allar atkvøðurnar lupu A um og settu í staðin kross við B, og Jørgen Niclasen fekk nakað at hugsa um. Vágafólk eru sambandsfólk. Nógv fólk arbeiða á og við flogvøllin, og tey eru kanska ikki heilt álvulig um yvirtøkuætlanina. Hóast vágatingmaðurin hjá Fólkaflokkinum hevur verið rættiliga sambandskur, var tað ikki nóg mikið at sissa vágamenn.

Nú var ein annar taktikkur lagdur: vit yvirtaka ikki flogvøllin nú, um hetta forðar fyri tí ætlaðu útbyggingini. Hvussu næsti leikur verður, vita vit ikki. Nýggi forsætisráðharrin hevur ikki havt tíð at hitta løgmann enn. Men á fyrsta fundinum skuldi málið berast upp á mál. Tað, sum tey flestu vistu, skuldi fram.

Grundleggjandi sigur aftur hetta málið okkum nakað um, hvussu lítið konstruktivur yvirtøkupolitikkurin - sjálvstýristilgongdin - er, tá ein viðmerking hjá flogvallarovastanum knappliga vendi øllum á høvdið. Men mangt er í neyðini nýtt, plaga fólk at taka til, og tað gera vit eisini á hesum sinni.

**Sosialurin**

# Einki hent á barnagarðsøkinum

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur*



Foreldrafeagið hevur púra rætt, tá ið tey siga, at einki er hent á barnaansingarøkinum síðani kommunuvalið. Hóast allir 13 býráðslimirnir í Havn eru valdir, tí tey lovaðu at økja um barnaansingina í kommununi, so er einki nýtt hent enn.

Stovnurin í Øksnagerði og hjá Føroya Tele eru báðir liðir í arbeiðinum hjá »gomlu« samgonguni, báðir stovnarnir vóru samtyktir og væl á veg, áðrenn verandi samgnongan tók við. Býráðssamgongan, sum sat frammanundan valinum, hevði lagt eina trý ára ætlan, sum segði: at í seinasta lagi ár 2003 skulu øll børn í kommununi í aldrinum 1/2 ár til 8 ár hava tilboð um mennandi barnagarðs- og frítíðarvirksemi.

Hesi ætlan hevur nýverandi samgonga eftir øllum at døma slept. Sambært fylgiskjølunum til fíggjarætlanina fyri 2002, so hevur samgongan útsett ætlanina um at nøkta tørvin á barnaansing. Sambært fylgiskjølunum so kann kommunan røkka málinum um 100% barnaansing í 2006. T.v.s. at tey nú hava útsett ætlanina í 3 ár.

Tað sigur seg sjálvt, at samgongan má útseta ætlanina, um vit skulu brúka hetta fyrsta árið sum dømi. Í januar afturkallaðu tey keypið av einum húsum, sum skuldu brúkast til frítíðarskúlan á Argjum. Tá lovaði formaðurin í mentamálanevndini, at eftir summarfrítíðina 2002 skuldi nýggjur stovnur verða komin á Argjum, bæði til barnagarðsbørn og frítíðarskúlabørn.

Beint undan summarfrítíðini bjóðaði býráðið arbeiðið til tveir barnagarðar út. Í heyst mátti arbeiðið afturkallast, tí nú var tilfarið so ógreitt, at eigin visti, hvat stóð í tí.

Eg taki undir við Foreldrafelagnum: Einki er gjørt fyri at loysa barnaansingar trupulleikan í Tórshavnar kommunu síðani valið. Mín áheitan á meirilutan í býráðnum er: Haldið tykkum til ta ætlan, sum var løgd fyri einum ári síðani og latið verða við at finnu uppá »samrtar« loysnir, sum als ikki kunna brúkast kortini.

# Útholaður ognarrættur

**Jákup Olsen**



Á forsíðu Dimmalættingar 18. desember sigur Bjørn á Heygum advokatur: *um landið yvirhøvur kann lata fiskirættindi til ávísar persónar ella feløg, tí tilfeingi er ogn Føroya fólks.*

Sjálvandi er havsins ríkidømi fólksins ogn, uppá sama máta sum ríkidømið undir havsins botni, oman á og undir jørðini, havnir, skúlaverk, heilsuverk og annað mangt eru tað. Skattur, MVG og avgjøld gera landsins kosnu menn og kvinnur til landsins ogn, sum skal forvaltast eftir fólksins vilja.

Sum ognari av landsins ogn krevur Føroya fólk, at Føroya løgting sum lóggávuvald og Føroya Landsstýri sum umsitari fær so stóran vinning úr tilfeinginum sum tilber.

Tá forsíðan á Dimmalætting tosar um kaotisk kjak, so er orsøkin til hetta kjakið einføld: Føroyski politikarin forvaltar ikki Føroya fólks ogn við omanfyrinevnda endamáli.

**Bjørn á Heygum**

Bjørn á Heygum sigur, at ógvuliga góðar grundir skulu til at broyta rættarligu støðuna í sambandi við at eiga fiskirættindi, at selja fiskirættindi og so trumfurin, at Føroya løgting hevur staðfest ruðuleikan við at frítaka sølu av fiskirættindum frá mvg-gjaldi.

**Spurningar til Bjørn á Heygum**

Hevur Føroya løgting brotið sína egnu »grundlóg« í fiskivinnulóggávuni við, at menn eiga fiskiloyvi og umseta fiskiloyvi. (les: kunnu spekulera í fiskiloyvum)?

Tá lógin sigur, at fiskatilfeingið er ogn Føroya fólks, hví kunnu so menn ganga við fiskiloyvum í reyvalummanum, uttan at skylda og ábyrgd fylgir við at fáa fiskin úr havinum?

Hvør munur er á oljuvinnuni í verk og fiskivinnuni í verki, sum báðar í fyrstu grein staðfesta, at tilfeingið er ogn Føroya fólks?

# Tónleikur í Jólacaféini í Runavík

JÓL
*Tíðindaskriv*

Í annaðkvøld, fríggjakvøldið, klokkan 20 verður livandi tónleikur at hoyra í jólacaféini í Hæddini. Tað eru kendu tónleikarnir, Hjalti og Jens Marni, ið fara at spæla tónleik fyri teim vitjandi. Kom inn á gólvið og vitja 9. a. úr Runavíkar Skúla, sum er til reiðar við einum heitum drekkamunni og onkrum góðum afturvið.

Fríggjadagin letur caféin upp kl. 16 og leygardagin kl. 10.

Næmingarnir úr 9. a. savna pening saman til eina námsferð til Skotland komandi vár. Ætlanin er, saman við læraranum, at vitja søgulig støð og læra um skotska mentan, sigur Eysturoyar Kunningarstova í tíðindaskrivi.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Sjúkrahúsleiðslan vanvirðir starvsfólkapolitikkin hjá Løgmansskrivstovuni

**Líggjas Høgnesen**



Leingi hevur ligið í luftini, at sjúkrahúsleiðslan arbeiðir í blindum. B6 gjørdi eina síðstu roynd at fáa eina loysn, men svarið tær fingu er ikki eitt svar, heldur eitt prógv uppá at leiðslan er óbúgvin. Ístaðin fyri at loysa konkreta trupulleikan á B6, dregur leiðslan eitt annað aspekt inn í málið, nevniliga B7. Tað er smart, tí tær hava frí og kunnu tí ikki taka støðu. Leiðslan vil hava B6 at taka støðu yvir høvdinum á B7. Forvirrandi? Hetta er taktikkur! Tað skuldi undra meg almikið, um leiðslan yvirhøvur hevur kunnað B7 um broytingarnar, hon hevur lagt fyri dagin.

Løgmaður og Løgmansskrivstovan hava orðað ein almennan starvsfólkapolitikk, og nógv er sum bendir á at leiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur sæð burtur frá hesum bóklingi. Fyrsta grein: **»Gott samstarv millum leiðslu og starvsfólk er ein fyritreyt fyri góðum arbeiðsumhvørvi … at leiðslan viðurkennir týdningin av at kunna starvsfólk um broytingar … endamálið við eini tílíkari kunning er at skapa trygleika … geva starvsfólki møguleika at verða tikin við í ráðum, tá ið broytingar verða gjørdar«.** Í fororðinum í bóklinginum sigur sjálvur løgmaður, at **»Almenni starvsfólkapolitikkurin skal tryggja tann týdning, sum mál, mið og menning hava fyri at skapa trivna, dygd og samstarv«.** Leiðslan hevur ikki virt eitt petti av hesum, ið er nevnt omanfyri. Hóast hetta, er »tíðin ikki búgvin« at leggja uppí, sigur Sámal Petur í Grund. Hvat skal til fyri at Sámal Petur vaknar úr dvala? Eg vóni at B6 og B7 síggja skriftina á vegginum og ikki lata seg lumpa av roykslørpolitikkinum hjá leiðsluni. Tá leiðslan uttan himpr og uttan at blinka sær burtur frá øllum paragraffum í almenna starvsfólkapolitikkinum, so átti tað at fingið avleiðingar bæði fyri landsstýrismannin og leiðslu Landssjúkrahúsins.

Sjúkrarøktarstjórin hevur víst so lítla virðing fyri røktarøkinum, at ein má øttast. Ein fer at ivast í, um hon yvirhøvur hevur útbúgving sum sjúkrasystir. Óbeinleiðis ákærir hon sjúkrasystrarnar at vera dovnar og rebelskar. Kastar røktarstjórin ikki køldu og arrogantu maskuna av sær, so missir landssjúkrahúsið virðismikla vitan, ið sjúkrasystrarnar gjøgnum nógv ár hava ognað sær.

Leiðslan hevur ein stóran trupulleika. Hon loyvir ongum – les – ongum – at koma við nøkrum stigum til batar á Landssjúkrahúsinum. Hetta hevur einans leiðslan patent uppá. Patentið gongur út uppá at einki skal henda, so einfalt er tað. Ofta verður sagt, at tær einfaldastu loysnirnar eru tær bestu. Tað einfaldasta var í sátt og semju at hækka normeringina á B6. Hetta hevur leiðslan ikki dugað og úrslitið er konfrontatión.

Sjúkrasystrarnar eiga at vita at tað eru nógv, ið stuðla teimum. Tær eiga eisini at vita, at eingin orsøk er at óttast. Tað er brúk fyri sjúkrasystrum eisini uttanlands. Arbeiðsumstøðurnar t.d. í Noregi er nógv betri og lønin munandi betri. Hóast sjúkrasystrarnar á B6 fara heim til hús, so er at vóna, at fokus verður sett á normeringar á øðrum deildum. Tí tað er greitt, at samlaða talið av sjúkrasystrum á SL er alt ov lágt. Haldið saman.

# Landbúnaðarálitið

**Brandur Sandoy**
*bóndi*

Herfyri kom nýtt landbúnaðarálit undan kavi, sum verður sagt at skula gera tað liviligari hjá bøndum í framtíðini. Vónandi verður hetta endamál rokkið innan alt ov langa tíð. Men hóast hetta er eitt stig á røttu leið, eru ikki allar súður syftar, um hetta fær undirtøku, tí at hetta álit nemur als ikki við tað, sum eg meti verða høvuðstrupulleikan í landbúnaðarvinnuni í dag, nevniliga at vinnan er alt ov einstáttað.

Gamaní, hetta er ein gularót fyri teir bøndur í mjólkaframleiðsluni, sum eru niðurundirkomnir av skuld, og alt gott um tað, teir treingja sanniliga til ein lætta, nú hvør kiosk í landinum er saneráð. Men eg óttist fyri, at um einki verður gjørt á hesum sinni, við at stuðla uppundir eina fjøltáttan av vinnuni, so kunnu tað fara at ganga nógv harrans ár, áðrenn nakar fer í holt við at gera broytingar aftur, tí at tað hevur víst seg at vera sera, sera leingi ímillum hvørja broyting, og harafturat er hetta eitt tað mest eldfima evni innan føroyskt lógarsmíð, væl stuðlað av ávísum persónum, sum hava til arbeiðis at vera blásibjølgar.

Høvuðsframleiðslan innan landbúnaðin hevur higartil verið mjólkin, men álvaratos, er hesin marknaðurin ikki mettaður fyri langari tíð síðani. Nú snýr tað seg bara um nøkur heilt fá ár, so er øll framleiðslan av mjólk løgd saman í størri og meiri rationellar eindir, har høgligast er at velta og mest bøur fæst. Hetta hevur Jarðarráðið jú eisini fingið sum sín setning, at festi skulu leggjast saman. Men tá samanlagt er, verður yvirskot av arbeiðsmegi, og har meini eg, at Jarðarráðið hevur skyldu at vísa á aðrar vinnuvegir innan landbúnaðin, og ikki sleppa fólki upp á fjall. Her meti eg eisini at Bóndafelagið kundi gjørt meir við upplýsing um alternativar vinnuvegir.

Einki er at ivast í, at tað eru aðrir vinnuvegir enn mjólkaframleiðsla, ið kunnu nýtast í Føroyum. Eitt gott dømi er Føroya Egg á Velbastað. Hvat er sum forðar, at vit kunnu verða sjálvbjargin við eggum, ella høsnarungum, dunnum og gæs? Ella hvat við pelsdjóraframleiðslu? Fóðrið er í landinum. Ja, enntá við jólatrøðum høvdu vit óivað kunnað verið sjálvbjargin. Men tað er tungt at byggja nakað nýtt upp, og fáa fólk at trúgva uppá vinnuvegir, sum als ikki høvdu kunnað borið til, fyri bert fáum árum síðani.

Tað er her myndugleikarnir høvdu kunnað gjørt munin, tí at ímeðan »vi ignoranter udi Færøe« sita kring jólaborðið og fylla magan við 27 daga gomlum høsnarunga og 7 vikur gamlari dunnu, standa danskarar og svenskarar og gnýggja sær í hondunum við lummunum fullum av føroyskum krónum. Høvdu myndugleikarnir latið eyguni upp fyri hesum stríða peningastreymi, ið fer av landinum, og stuðlað uppundir egna framleiðslu ístaðin, so høvdu vit verðið sjálvbjargin við fleiri landbúnaðarvørum um 2-3 ár.

Ein møguleiki at stuðla er at lata okkum í landbúnaðinum fáa peningin endurrindaðan, ið vit nýta til flutning innanoyggja. Hetta tiltak hevur verið galdandi fyri útoyggjar í fleiri ár, og er lívsneyðugt fyri fólkið har býr. Ein sannroynd er, at vørur eru dýrari at flyta innanoyggja, enn tær eru at flyta til landið, og tí haldi eg avgjørt, tíðin er komin, at hesin stuðul verður galdandi fyri alt landið, tí at vit mugu ásanna, at vit verða ikki kappingarfør við lággóðsku ídnaðarvørurnar, ið floyma inn yvir okkum úr landsuðri, uttan so at bøtandi tiltøk verða sett í verk. Fiskivinnan hevur jú eisini fingið flutningsstuðul innanoyggja, sum bøtur um gagnnýtsluna og effektivitetin.

Ein annar møguleiki er at endurrinda okkum meirvirðisgjaldið fyri allar vørur vit framleiða. Hetta tiltak hevði munað so væl, at vit høvdu sæð ein metvøkstur í framleiðsluni sum er, samstundis sum nýggjar vinnugreinar høvdu tikið seg upp og minkað um innflutningin, landinum at frama.

Landbúnaðarálitið fer at bøta um støðuna hjá mjólkabøndunum, men tað er sera ivasamt, hvat gagn allir hinir bøndurnir fáa av álitinum, tí at neyvan verður nakar saneraður, við so relativt lítlari skuld, sum hesir bøndir hava. Tað fer heldur at bera á hitt borðið, at ein skal keypa jørðina, og harvið verða meira niðurbundin av skuld. Eg haldi tí ikki, at landsjørðin skal verða sett á sølulista, tí at hetta fer ikki at loysa teir grundleggjandi trupulleikarnar hjá meirlutanum av bøndrum. Heldur átti Jarðarráðið at fingið heimild at sanera, og so skuldi fíggjarliga ábyrgdin verðið herd, so at festarin hefti persónliga fyri alla skuld, hann tekur á seg. Verður skuldin hereftir ov stór, má tað fáa avleiðingar fyri festaran. Harafturat skuldi verið álagt Jarðarráðnum at stuðla alternativum ætlanum, so at vit fáa fleiri bein at standa á innan jarðarbrúkið.

Gleðilig jól og gott nýár.

# Suðringar eitt gloymt fólkaslag

**Eli Lassen**

Nú er aftur galið, suðringar skulu fáa eitt nýtt skip, Føroya størsta íløga.

Haldi tað er so langt úti, sum nakað snøri kann røkka, havi roynt ein túr við Ternuni í vardi 7 tímar av Tvøroyri og til Havnar.

Menn tit politikkarar/pressan hyggja sjálvandi eftir krónum og oyrum, ikki eftir suðringum, sum ein partur av Føroyum.

Jú millónirnar eru nógvar til hetta skip, og nakað skal nýtast til ferjulegu, men tað er so langt úti, at tit grenja so nógv um hettar.

Landsverkfrøðingurin hevur brúkt so nógvar milliónir krónur til so nógv býtt, at roksa um eitt skip til suðringar er skrall tómt. Fyri at taka bara tvey dømi um hetta, so kann eitt hol gjøgnum Nýpin, (farleiðin Vág/Lopra) vera tað fyrsta dømið, har hava menn arbeitt tey síðstu 50 árini við at rudda o.t., og tað verður ongantíð trygt at koyra har, fyrr enn eitt hol verður borað. Tað annað og meira svakt er alt arbeiðið, sum verður gjørt undir Gøtueiði. - Hví ræðist Landsverkfrøðingurin so nógv at bora ein tunnil undir Gøtueiði, tí trupulleikin fyri ferðsluna liggur ikki omanfyri Søldafjørð/Skipanes, men brekkan niðan frá Syrðugøtu er trupulleikin, vaknið einaferð!!!!.

Hvat er galið við tykkum relativt klóku stýrandi fólkum?

– Je spyrje bara, ikki øsa tykkun upp.